# Overvað net um høgtíðina

**Fartelefonnetið hjá Føroya Tele varð overvað um høgtíðina. Hetta hevði við sær, at sms-boð vórðu send umaftur og umaftur**



*Fartelefonnetið hjá Føroya Tele var ovurvað, og tí vórðu nøkur sms-boð send umaftur millum 20 og 40 ferðir. Føroya Tele sigur tó, at kundarnir koma sjálvandi ikki at gjalda fyri hetta*

*Savnsmynd*

TELEFONNET

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Um høgtíðina vóru tað fleiri, sum høvdu trupulleikar av sms-boðum og fartelefonunum. Tað kom fyri hjá nógvum, at eini sms-boð vórðu send fleiri ferðir upp í saman. Nøkur millum 20 og 40 ferðir.

Richard Mortensen, marknaðarleiðari á Føroya Tele, sigur, at bæði jóladag og nýggjársaftan/nýggjársmorgun vóru stórir trupulleikar við netinum, tí tað var ovurvað.

– Maskinurnar megnaðu ikki at fylgja við øllum aktivitetinum, men ongin kemur at gjalda nakað eyka fyri tey smsboðini, ið vórðu send ov nógv, tryggjar Richard Mortensen kundarnar um.

Goldið verður tískil bert fyri tað eina boðið, og ikki fyri tey 20-40, sum eru móttikin í hinum endanum.

Føroya Tele fer at fáa eina nýggja sms-støð í januar mánaði, og hon kemur væntandi at loysa allar trupulleikarnar hjá stovninum viðvíkjandi sms-boðum.

# Løgmaður kom væl frá uppgávuni

**Formaðurin í Sjálvsstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, heldur, at løgmaður, Jóannes Eidesgaard, kom væl frá síni fyrstu nýggjársrøðu**

NÝGGJÁRSRØÐA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Løgmaður kom víða um, og var ikki serliga ítøkiligur, men tað skal hann helst heldur ikki vera í slíkum røðum, vísir Kári P. Højgaard á*

*Mynd: Savnsmynd*

– Eg haldi, at røðan var góð. Samanumtikið var hon bæði stimbrandi, mennandi og eggjandi.

Formaður Sjálvsstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, heldur, at løgmaður, Jóannes Eidesgaard, kom væl frá fyrstu nýggjársrøðu síni. Hann heldur, at nýggjársrøðan hesaferð var rættiliga lík nýggjársrøðum undanfarin ár.

– Løgmaður kom víða um, og var ikki serliga ítøkiligur, men tað skal hann helst heldur ikki vera í slíkum røðum, vísir Kári P. Højgaard á.

Spurdur, um hann beit merki við nakran ávísan politiskan boðskap í nýggjársrøðu løgmans, svarar Kári P. Højgaard, at persónliga fegnaðist um, at løgmaður segði seg vera heitan fyri kommunalu samanleggingunum kring landið.

## Orð og gerðir

Kári P. Højgaard hevur kortini eitt hjartasuff viðvíkjandi nýggjársrøðuni hesaferð. Í partinum um búskaparstøðu Føroya, heldur formaður Sjálvsstýrisfloksins, at lítið samsvar er millum orð og gerðir hjá løgmanni og landsstýrinum.

– Í røðuni nemir løgmaður við, at tað er av stórum týdningi at vit áhaldandi menna vælferðarsamfelagið, og í tí sambandi vil eg vísa á, at skattalættin hjá samgonguni er við at máa grundarlagi undan vælferðini, tí gjógvin millum tey ríku og tey, sum eiga minni, økist. Í tí partinum av nýggjársrøðuni var einki samband millum orð og gerðir hjá landsstýrinum, heldur Kári P. Højgaard.

Formaður Sjálvsstýrisfloksins vísir á, at í sambandi við framtíðar føroyska oljuvinnu, var løgmaður rættiliga jarðbundin í nýggjársrøðu síni.

– Hóast tað sær ógvuliga bjart út viðvíkjandi nýggjasta oljufundinum hetlendskumegin føroyska markið, so var løgmaður rættiliga jarðbundin í nýggjársrøðu síni, og tað haldi er ógvuliga skilagott av honum, sigur Kári P. Højgaard.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 1, 2005
www.kaupthing.fo

# Arbeiðsmarknaðarfrágreiðing fríggjadagin

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku vóru kunngjørd tøl fyri amerikanskt brúkara- og vinnuálit.

Brúkaraálitið vaks meir enn væntað, meðan vinnuálitið lækkaði meir enn væntað, so tað var einki greitt tekin haðani. Tað vóru heldur ikki lyklatølini, ið stýrdu gongdini á fíggjarmarknaðinum ta síðstu vikuna í 2004. Vikan varð merkt av, at sera lítið varð handlað.

Tað hevði, eins og vikuna áðrenn, við sær, at tað sum var av størri handlum, flutti marknaðin meir enn vanligt. Danska 10-ára rentan sveiggjaði soleiðis umleið 0,15% hesar dagarnar.

Fríggjadagin kemur amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri desember mánað. Hon hevur verið týdningarmesta hendingin hvønn mánaða í 2004, og tað sama kann væntast komandi mánaðirnar. Orsøkin til, at hon hevur ávirkað fíggjarmarknaðirnar so nógv er, at íleggjarar ikki enn eru sannførdir um, at búskaparligi vøksturin í USA er nóg væl grundaður til at nóg nógv fólk koma í starv og harvið fáa møguleika til at økja um nýtsluna. Fyrstu 11 mánaðirnar í 2004 vórðu í miðal sett 185.000 nýggj størv á stovn um mánaðin, tá sæð verður burtur frá landbúnaðinum. Tað er oman fyri tey umleið 150.000, sum skulu til, fyri at arbeiðsmarknaðurin kann fylgja við vøkstrinum í fólkatalinum. Sostatt vísa tølini fyri 2004 sum heild á ein hampuliga sterkan arbeiðsmarknað. Tølini fyri nýggj størv sveiggja tó nógv, og tað er eisini ein partur av orsøkini til, at fíggjarmarknaðirnir flyta seg so nógv, tá frágreiðingin kemur. Marknaðirnir vænta, at 175.000 nýggj størv vóru sett á stovn í desember.

Arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin er soleiðis tann týdningarmesta hendingin hesa vikuna. Haraftrat koma ídnaðarálitistøl bæði úr USA og Evropa, umframt evropisk prísvakstrartøl.

Jaliga rákið á partabrøvum seinastu vikuna í 2004 helt fram inn í 2005.

Lækkandi oljuprísir seinastu tíðina hava birt undir bjartskygni hjá serliga framleiðslufyritøkunum sum nú ikki óttast útlitini fyri einum høgum oljuprísi eins nógv.

Í næstu viku kunngera Intel, Apple, Yahoo og IBM sínar ársroknskapir, sum kunnu ávirka gongdina á partabrøvum. Men hesa vikuna verður tað serliga umrødda arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, ið fer at ávirka marknaðirnar.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,51% | 0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,12% | 0,08% |
| 10 ára lánsbræv | 3,85% | 0,08% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 286,7 | 0,1% |
| OMX, Svøríki | 741,9 | 0,0% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.951,2 | 0,0% |
| S&P 500, USA | 1.211,9 | 0,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,47 | -0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 171,95 | -0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 86,99 | -0,2% |
| Altjóða Vøkstur | 59,25 | 0,3% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,50 | 0,0% |
| EUR | 7,44 | 0,0% |
| GBP | 10,53 | -0,5% |
| NOK | 0,90 | 0,5% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*